# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Elsu Midjord av Øðrum** fer úr kapellinum á Suðuroyar sjúkrahúsi í dag kl 17. Jarðarferðin verður úr kirkjuni á Leiti týsdagin kl 13. Sungið verður úr Sálmabókini.

**Ester Abrahamsen, ættað av Eiði búsitandi í Tórshavn** fer til gravar úr Vesturkirkjuni í dag klokkan 14.

**Bjarni Müller Poulsen, vanliga nevndur Bjarni hjá Bernhard í Hvalba, ættaður úr Vági,** fer til gravar úr Nordre Kapel á Vestre Kirkegaard, mikudagin klokkan 13.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaða mamma, omma og vermamma

**Ingrid Isholm**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar, vitjanir og uppringingar. Somuleiðis ein serstøk tøkk til talarar og sangarar, og tey, ið hjálptu til við ervið í Ebenezer og til Poul Færø fyri vitjanir og troystarrík orð.
Tøkk øll, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Jóhanna Maria og Kristin**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæri

**Jens Johannes Joensen**
Svínoy

andaðist og fór til gravar.
.
Takk til øll, sum vóru um hann ta seinastu tíðina.
Takk til talarar og organist.
Takk til gravarar og tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum og á ymsan hátt.
Og til tykkum, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Birgit**

# Ein lítil maður við stórum hjarta

## Minningarorð um Gunnar Guttesen

Frá tí degi vit máttu ta tungu leið út á gravarbakkan at fylgja elskaða pápa okkara og siga honum eitt síðsta farvæl hesumegin grøvina, havi eg so mangan ætlað mær at skriva eitt lítið minningarorð um hann.

Aldri er tað tó blivið til meir enn eina kladdu við nøkrum lýsingarorðum, sum bert áttu at verið nýtt um onkran, ið er meir enn bara menniskja.

Oftast spurdist einki burturúr, antin av tí at orð kendust ov fátøk til at lýsa babba og tað, hann var fyri meg, ella tí at orðini á lepanum vatnaðust út og gjørdust ólesilig av tárunum, ið duttu á blekkið.

Nú eg aftur setti mær fyri at fáa nakrar reglur á pappír, kom eg í tankar um ein eldri mann, sum einaferð spurdi meg, hvørs sonur eg var. Tá eg so segði honum, at eg var sonur Gunnar Guttesen, svaraði hann mær: "Á, Gunnar, ja, hann er av størstu monnum!" Hugsaði við mær sjálvum: "Hasin kennir nokk ikki babba. Hann má vera í ørviti ella blanda við onkran annan." Babba var ikki av størstu monnum. Hann var lítil maður. Men hann var ein lítil maður við stórum hjarta!

Áðrenn eg aftur missi jarðsamband og fari at nýta ov stór rósandi orð um babba, so skundi eg mær at minna meg sjálvan á, at hann bara var eitt vanligt menniskja sum vit onnur. Hann var ikki fullkomin.

Tað visti hann sjálvur, og kom tað einamest til sjóndar, um tú hugdi í Bíbliuna hjá honum. Tú sást skjótt, at hon var nýtt til meira enn bert at savna støv. Tí sum tú blaðaði ígjøgnum síðurnar, sást tú, hvussu hann ikki bara las hana, men hvussu hann eisini undirstrikaði versini, sum vóru honum kær.

Tá tú so komst til 2. Timoteusbræv, fanst tú ein lepa liggjandi millum síðurnar. Á lepanum stóð skrivað: "... eru vit ótrúgv, verður Hann tó verandi trúgvur, tí avnokta Seg sjálvan kann Hann ikki."

Hettar versið var ikki bara undirstrikað í sjálvum tekstinum, men skrivað á lepa og lagt millum síðurnar. Hví! Tí hettar versið var honum serstakliga kært. Ja, tað var hetta, hann trúði og hvíldi í – sannleikanum um, at hann sum ófullkomið menniskja kundi við einfaldari trúgv byggja lív sítt á Harran Jesus, sum er fullkomin!

At Bíblian ikki bert var nýtt til



at savna støv, sást eisini aftur í lívi hansara. Hann førdi út í lívið tað, hann trúði. Hann livdi tað, hann las.

Hóast hann ikki kroysti sínar andaligu sannføringar niður yvir høvdið á okkum, so kundi hann tó onkuntíð – á rættari tíð! – taka til eitthvørt úr Bíbliuni, og tá vóru fáu orðini oftani meira sigandi enn fleiri talur.

Tá eg nú hugsi um babba, so er tað ikki so nógv, hvat hann gjørdi ella segði, sum myndaði hann. Meira, hvør hann var. Tað var hetta, sum hevði slíka ávirkan á okkum, sum stóðu honum nær. Tað leggja vit einamest til merkis, nú hann ikki er her longur – tað veldiga tómrúmið, sum stendur eftir ein mann, sum var so friðarligur. Var tað ikki fyri tað lívsglaða bríkslið, ja, so visti man mangan ikki, nær hann kom ella fór.

Babba var ikki ein høgt lærdur maður, men hann var tó ein veldigur lærimeistari! Jú, ein lærumeistari í handverki og tí húsliga, men ikki bara á tann hátt. Hann var ein veldigur lærimeistari í menniskjaligari góðsku.

Umframt at hann við stilla lívi sínum, uttan orð, lærdi okkum at vera tolin, vinalig, takksom, trúføst, álítandi og eyðmjúk, so var tað serliga hjartalag hansara, sum var fyrimyndarligt – kærleikin til onnur.

Men hvat var tað fyri kærleiki, hann lærdi okkum at elska onnur við? Var tað hin nútímans 'Hollywood kærleikin' sum dagliga verður borðreiddur í stovum okkara? Ella kærleikin, sum er grundaður á onkra 'Hendes verden filosofi' – ein navnkærleiki, sum ikki heldur nakað hjúnaband saman, til deyðin skilir? Ein kærleiki, sum í roynd og veru ikki er meiri enn eitt bland av havisjúku og svikaligum kenslum? Ein kærleiki, sum setir meg, mítt og tað, sum eg vil hava, í miðdepilin? Nei. Tvørturímóti. Babba var lærumeistari í kærleikanum, sum hevur røtur sínar í Orði Guds – kærleikin, hann hevði funnið hjá Jesusi. Babba var meistari í agape kærleikanum – kærleikin, sum "søkir ikki sítt egna" (1. Korintbræv 13,5).

Tá eg nú hyggi at lívi hansara, er tað eyðsæð, at hann søkti ikki sítt egna. Hann hevði millum annað góð evnir at spæla fótbólt, men hann setti í besta aldri fótbóltskógvarnar á hillina fyri tað, sum hevði størri týdning fyri hann – familjan. Hann hevði óvanliga góð tónleikaevnir, men tað var skjótt, hann flutti seg av orgulstólinum, sum hann so ofta sat á, so vit onnur kundu sleppa framat at pumpa og klimpra uppá gamla orgulið.

Spurdi hann fleiri ferðir, um hann ikki kundi spæla okkurt av løgum sínum fyri okkum. Svarið var altíð hitt sama: "Nei, eg vil heldur njóta og lurta eftir tykkara løgum enn at spæla míni." Kærleikin søkir ikki sítt egna. Babba søkti ikki sítt egna, men setti tað til viks fyri mammu og okkum.

Eg eri so glaður fyri, at hann ta síðstu løtuna av lívi sínum lá og helt um mammu. Tað var so sigandi um alt lív hansara. Tí øll hansara orka, tíð og evnir fóru til at elska, halda og vera um okkum sum familja.

Jú, vit hava mist ein góða pápa, og mamma hevur mist ein góðan mann.

Eg sakni bríkslið, drekkamunnarnar, skemtið, fótbóltsprátini, láturkramparnar. Eg sakni babba. Eg gleðist tó um, at hann livir víðari í hesum lívi í systkjum mínum – í skemtinum hjá Christu, í tónleikinum hjá Mariu, í kreativitetinum hjá Sólvu, í fryntligheitini hjá Gunnfríð, í handalagnum hjá Ragnari og í klaverspælinum hjá Gunnari.

Eg takki Gudi fyri, at Hann unti mær babba sum pápa, og gleði meg skjótt at síggja hann aftur har, sum vit aldri aftur skulu skiljast.

**Regin Gunnarsson Guttesen**

**Dagurin**

**6. februar. Duruta**, deyð umleið ár 300. Henda unga gentan í Kesarea í Kappadokiu vildi heldur ikki vita av einum heidnum friggjara, sjálvum landshøvdinginum, og hann læt hana hálshøgga. Navnið Dorothea er grikst og merkir Guðs gáva.

veitst tú ikki tað?
Sosialurin